# Frágreiðing frá Barnaverndastovu Føroya grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og fosturforeldraskipanini


1. UPPBÝTIÐ Í BARNAVERNDARTÆNASTUR ........ 2

2. HVUSSU BYRJA BARNAVERNDARMÁLINI ........ 5

3. FÍGGING - KOSTNAÐUR AV BARNAVERND ........ 9

4. FOSTURFORELDRASKIPANIN ........ 12

5 . SSP- SKIPANIN ........ 15

6. MANNAGONGD OG BAKGRUND ........ 16

# 1. Uppbýtið í Barnaverndartænastur

Barnaverndarlógin ásetur, at landið skal skipast í barnaverndarøkir við í minsta lagi 1500 íbúgvum í hvørjum øki. Orsøkin til, at barnaverndarlógin álegði smærri kommunum at samstarva í barnverndarmálum er, at talan er um trupul og viðkvom mál.

Áðrenn henda barnaverndarlógin kom í gildi, vóru trupulleikar við ógegni og rættartrygd, sum var umráðandi at fáa loyst, og mett var, at størri eindir við skikkaðum fólki í umsitingini var gongda leiðin.

Tá lógin varð sett í gildi, varð landið skipað í 8 barnaverndarøki. Síðani eru broytingar hendar í samstarvinum millum kommunur umframt samanleggingar av kommunun, sum hava viðført, at tvey barnverndarøki eru komin afturat. Føroyar eru tí í dag býttar upp í 10 barnaverndarøki ella **barnverndartænastur,** sum er felagsheiti fyri barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting.

**Talva.1 Uppbýtið í barnaverndatænastir**

| Barnaverndar øki | Kommunur |
|---|---|
| Sosiala deild Tórshavn | **Tórshavnar** |
| Sosiala deild Runavík | **Nes**<br>**Runavíkar**<br>**Sjóvar** |
| Sosiala deild Klaksvík | **Fugloyar**<br>**Klaksvíkar**<br>**Kunoyar** |
| Barnaverndartænastan, Sandavágur | **Kvívíkar**<br>**Vestmanna**<br>**Vága**<br>**Sørvágs** |
| Barnaverndartænastan í Sunda kommuna: | **Viðareiðis**<br>**Hvannasunds**<br>**Húsa**<br>**Eiðis**<br>**Sunda** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | **Hvalbiar**<br>**Tvøroyrar**<br>**Fámjins**<br>**Hovs**<br>**Sumbiar** |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu: | **Eystur** |
| Suðuroyar Sunnara barnaverndartænasta | **Porkeris**<br>**Vágs** |
| Barnaverndartænastan í Fuglafirði: | **Fuglafjarðar** |
| **Sandoyar Barnaverndartænasta** | **Skopunar**<br>**Sands**<br>**Skálavíkar**<br>**Húsavíkar**<br>**Skúvoyar** |




Í Føroyum vórðu í 2009, skrásett 752 barnaverndarmál í hagtalsskipanini hjá Barnaverndarstovu Føroya.

Barnaverndarmál eru sera ymisk, og munur er á, hvussu arbeiðskrevjandi einstøku barnaverndarmálini eru. Málini kunnu snúgva seg um einfalda ráðgeving, men eisini um børn, sum verða sett heiman móti viljanum hjá foreldunum, sokallað umsorganaryvirtøka uttan samtykki. Tí ber illa til at samanbera støðuna í einstøku barnaverndartænastunum, tí talið eitt einstakt ár í sjálvum sær, sigur ikki so nógv um støðuna. Við tíðini vilja hagtølini kunnu vísa okkum, um talið av barnaverndarmálum broytist, og um fyrsiskipanirnar, barnaverndartænasturnar seta í verk, tæna endamálinum.

Hagtalsskrásetingin er skipað soleiðis, at hvørt barnið sær er skrásett, sum eitt mál. Hetta merkir, at ein familja kann verða skrásett, sum fleiri barnaverndarmál í skipanini, um stuðul verður veittur fleiri børnum í somu familju.

**Talva nr. 2: Tal av barnaverndarmálum í 2009**

| Barnaverndar øki | Gentur | Dreingir | Íalt | Børn 0-21 ár í økinum | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosiala deild Tórshavn | 210 | 189 | 399 | 6.638 | **6,0** |
| Sosiala deild Runavík | 29 | 29 | 58 | 2.080 | **2,8** |
| Sosiala deild Klaksvík | 46 | 44 | 90 | 1.582 | **5,7** |
| Barnaverndartænastan, Sandavágur | 17 | 23 | 40 | 1.583 | **2,5** |
| Barnaverndartænastan í Sunda kommuna: | 13 | 20 | 33 | 1.117 | **3,0** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 28 | 31 | 59 | 899 | **6,6** |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu: | 5 | 4 | 9 | 688 | **1,3** |
| Suðuroyar Sunnara barnaverndartænasta | 9 | 7 | 16 | 528 | **3,0** |
| Barnaverndartænastan í Fuglafirði: | 9 | 11 | 20 | 485 | **4,1** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 11 | 17 | 28 | 442 | **6,3** |
| **Alt landið** | **377** | **375** | **752** | **16.042** | **4,1** |

Talvan vísir, at mál í % av barnatalinum er 4,1 fyri alt landið. Tvøroyri hevur størsta lutfallsliga talið av málum í mun til barnatalið. Stóru økini Tórshavn og Klaksvík liggja nakað omanfyri miðaltalið, soleiðis, at Tórshavn hevur 6,0 mál í % av barnatalinum, meðan Klaksvík hevur 5,7 mál í % av barnatalinum.

Eysturkommuna og Suðuroyar Sunnara Barnarvendartænasta hava ávikavist 1,3 og 3,0 mál í % av barnatalinum. Her skal havast í huga, at barnatalið og talið av málum er so lágt, so eitt mál meira ella minni ger stóran mun í hagtalshøpi, við øðrum orðum, jú minni økir, jú størri óvissa.

Runavík, sum er næststørsta økið í landinum, liggur, við 2,8 málum í % av barnatalinum, væl lægri enn landsmiðaltalið. Tað kunnu verða fleiri orsøkir til hetta. Barnaverndartænastan í Runavík vísir á, at ein orsøk helst er, at tað er ein vælvirkandi NSR tænasta í økinum.

**Talva nr. 3: Tal av barnaverndarmálum býtt á aldur og kyn**

| Aldursbólkur | Gentur | Dreingir | Íalt |
|---|---|---|---|
| 0 – 6 ár | 74 | 79 | **153** |
| 7 – 13 ár | 126 | 152 | **278** |
| 14 – 18 ár | 151 | 126 | **277** |
| 19 – 20 ár | 19 | 17 | **36** |
| 21 ár og eldri | 4 | 4 | **8** |
| **Íalt** | **374** | **378** | **752** |

Á talvuni omanfyri sæst, at tað eru tveir aldursbólkar, har tað eru serliga nógv mál.
Tað er aldursbólkurin 7 til 13 ár, og bólkurin 14-18 ár, har seinni bólkurin lutfalsliga er størstur. Býtið millum gentur og dreingir er soleiðis, at tað eru nakað fleiri dreingir enn gentur í yngra bólkinum, sum samsvarar væl við, at gentur, ið hava trupulleikar í hesum aldrinum eru heldur stillari enn dreingir, sum ofta eru lættari at fáa eyga á. Tó er vert at leggja til merkis, at tá vit tosa um eldra aldursbólkin, tey 14 til 18 ára gomlu, so eru fleiri gentur enn dreingir nú, ið gerast barnaverndarmál. Okkurt bendir tí á, at genturnar eru eldri, tá teirra trupulleikar gerast sjónligir. Helst hava gentur eisini lættari við at søkja sær hjálp enn dreingir í tannáringarárunum.

Bólkurin 0-6 ár er minni enn hinir bólkarnir. Hetta samsvarar eisini við tøl frá øðrum Norðanlondum, har tað er ein eyðkendur trupulleiki, at børnini gerast ov gomul, áðrenn trupulleikarnir gerast sjónligir. Tí kann sigast, at hjálpin verður helst sett ov seint inn. Hetta er óheppið og nakað, sum vit eiga at leggja okkum eftir at broyta, tí tíðin er sera avgerandi í einum barnaverndarmáli.

## 2. Hvussu byrja barnaverndarmálini

Barnaverndarlógin fevnir sambært lógarviðmerkingunum bert um børn, ið liva undir viðurskiftum, sum skaða teirra heilsu og menning.

Við nýggju barnaverndarlógini ynskti lóggevarin, at barnaverndartænasturnar skuldu fáa møguleika at savna sína orku, um tey børn í samfelagnum, sum hava tørv á stuðli og hjálp. Tí fevnir barnaverndarlógin ikki um trivnaðin hjá børnum yvirhøvur, og fevnir heldur ikki um brekað børn uttan so, at tey liva undir umstøðum, sum skaða teirra heilsu og menning.

Fyri at tryggja, at barnaverndartænasturnar fáa kunnleika um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið ikki eru nøktandi, er fráboðanarskylda ásett í barnaverndarlógini.

Lógin um barnavernd er sera greið, tá talan er um fráboðan. Øll hava skyldu at boða myndugleikunum frá, um tey hava kunnleika um børn, ið eru fyri misrøkt. Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilur tó ímillum vanliga borgaran, ið kann verða ónavngivin, og tann, sum í starvi sínum hevur við børn at gera. I seinna førinum er kravið, at fráboðanin skal verða navngivin.

Fráboðanarskyldan í Barnverndarlógini:

> *§ 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera, og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.*
>
> *Stk. 2. Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meinslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.*
>
> *Stk. 3. Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna álvarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar.*
>
> *Stk. 4. Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.*

Ein fráboðan sambært hesi grein merkir ikki, at barnaverndartænastan hevur skyldu at seta fyriskipanir í verk. Barnaverndartænastan hevur bert skyldu at kanna og upplýsa málið, og um komið verður fram til, at tað ikki er grundarlag fyri at seta fyriskipanir í verk, skal barnaverndartænastan onki gera.

**Talva nr. 4: Nýggj barnaverndarmál í 2009 í mun til barnatalið**

| Barnaverndar øki | Gentur | Dreingir | Íalt | Børn 0-21 ár í økinum | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosiala deild Tórshavn | 83 | 77 | 160 | 6.638 | **2,4** |
| Sosiala deild Runavík | 5 | 9 | 14 | 2.080 | **0,7** |
| Sosiala deild Klaksvík | 24 | 18 | 42 | 1.582 | **2,7** |
| Barnaverndartænastan, Sandavágur | 9 | 5 | 14 | 1.583 | **0,9** |
| Barnaverndartænastan í Sunda kommuna: | 8 | 11 | 19 | 1.117 | **1,7** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 19 | 21 | 40 | 899 | **4,4** |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu: | 3 | 3 | 6 | 688 | **0,9** |
| Suðuroyar Sunnara barnaverndartænasta | 3 | 2 | 5 | 528 | **0,9** |
| Barnaverndartænastan í Fuglafirði: | 4 | 8 | 12 | 485 | **2,5** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 1 | 4 | 5 | 442 | **1,1** |
| **Alt landið** | **159** | **158** | **317** | **16.042** | **2,0** |

Tvøroyri hevur fingið fingið flest nýggj mál í mun til barnatalið. Tvøroyri hevur næstan tvífalt so nógv mál, sum tey næstu á listanum, sum eru Klaksvík, Fuglafjørður og Tórshavn. Eitt einstakt ár er ikki so áhugavert í hagtalshøpi, og tí vilja slík tøl sum hesi, hava størri upplýsandi virði komandi árini, tá samanberast kann við undanfarin ár.

Næststørsta barnaverndarøkið sæð í mun til barnatalið, Runavíkar kommuna, hevur sera fáar skrásetingar. Orsøkin kann verða, sum nevnt til talvu 2, ein vælvirkandi NSR tænasta.

**Talva nr. 5: Hvør fráboðar**

| Fráboðari | Íalt |
|---|---|
| Almannastovan | **3** |
| Annað barnaverndarøki | **11** |
| Dagstovnar, frítíðarskúli og dagrøkt | **16** |
| Barnið sjálvt | **5** |
| Familja - onnur enn foreldur | **11** |
| Foreldur | **102** |
| Heilsufrøðingur | **39** |
| Jarðamóður og lækni | **14** |
| Løgreglan | **16** |
| Psykiatriski depilin | **14** |
| Skúli | **30** |
| Onnur | **51** |
| **Í alt** | **312** |

Á talvuni omanfyri sæst, at tann fakbólkurin, sum fráboðar oftast eru heilsufrøðingar.

Heilsufrøðingar koma inn í myndina tíðliga í lívinum hjá barninum. Teir koma inn í øll smábarnaheimini, sum tann einasti fakbólkurin, og seinni møta teir tí einstaka næminginum í skúlanum. Helst er talið av fráboðanum frá heilsufrøðingunum eisini eitt úrslit av einum miðvísum upplýsingararbeiði millum heilsufrøðingar og ein ásannan av týdninginum at fráboða.

Ein kann undrast á, at talið av fráboðanum frá dagstovnum, frítíðarskúlum og dagrøkt einans er 16, tá hugsað verður um, at hesir stovnar hava tætt og dagligt samband við børn og foreldur. Tað kann vera, at tætta sambandið ger, at hesin bólkur í staðin fyri at fráboða, heldur mælir foreldrunum til, at søkja sær hjálp hjá barnaverndartænastuni, og hetta kann tí verða við til at gera bólkin foreldur til so stóran bólk, sum hann er. Harumframt kann hugsast, at trupulleikar hjá smáum børnum eru lættari at handfara hjá starvsfólkunum, og tí verður ikki fráboðað beinanvegin, men starvsfólkini ístaðin sjálvi arbeiða við at menna og styrkja tað einstaka barnið í samstarv við foreldrini.

Frá skúlum er talið av fráboðanum nakað hægri, nevniliga, 30, í 2009. Skúlin hevur eisini tætt og dagligt samstarv við næmingarnar, men hevur ikki so tætt samband við foreldrini, sum dagstovnarnir hava. Hetta kann helst gera tað nakað lættari hjá fakfólkunum, ið starvast í skúlanum, at fráboða. Sum fyrr nevnt, er ein orsøk helst eisini, at trupulleikarnir gerast týðiligari, tá børnini gerast eldri. Tó skal viðmerkjast, at ein orsøk kann verða, at í skúlanum verða næmingarnir ofta vístir til heilsufrøðingin á skúlanum, áðrenn nøkur fráboðan verður gjørd, soleiðis at tølini fyri heilsufrøðingar gerast størri, meðan fráboðanirnar frá skúlunum tað minni.

Síðani nýggja skipanin við barnaverndartænastum, við umsitingum mannaðum av fakfólki varð sett á stovn við barnverndarlógini frá 2006, hava starvsfólkini í barnaverndartænastunum havt varhugan av, at ein hugburðsbroyting er farin fram í Føroyum. Familjur við trupulleikum og fakfólk síggja í dag meira og meira barnaverndartænasturnar sum stovnar, har møguleiki er at fáa stuðul, vegleiðing og hjálp, og ikki so nógv sum eftirlitsmyndugleikar longur. Á talvuni sæst, at flestu barnaverndarmálini byrja við, at foreldrini sjálvi venda sær til barnaverndartænasturnar, og tá er útgangsstøðið nógv betur at gera mun, enn tá hjálpin og vegleiðingin verður tvungin.

**Talva nr. 6: Orsøkir til at mál byrja, trupulleikar hjá barni**

| **Orsøk** | Gentur | dreingir | Íalt | %-býti |
|---|---|---|---|---|
| Kensluligir trupulleikar | 28 | 18 | 46 | **14** |
| Trupulleikar í skúlanum | 20 | 25 | 45 | **13** |
| Atferðar- og/ella tillagingartrupulleikar | 16 | 24 | 40 | **12** |
| Umsorganarsvík | 18 | 21 | 39 | **12** |
| Ógvuslig misljóð/disharmoni í heiminum | 13 | 12 | 25 | **7** |
| Kynsligur ágangur á barni | 12 | 6 | 18 | **5** |
| Hjúnaskilnaður – samverutrupulleikar | 10 | 8 | 18 | **5** |
| Sjálvoyðandi atburður | 11 | 6 | 17 | **5** |
| Trupulleikar í frítíðini | 8 | 6 | 14 | **4** |
| Harðskapur ella hóttan um harðskap | 5 | 7 | 12 | **4** |
| Kriminellur atburður | 0 | 11 | 11 | **3** |
| Seinmentur - Sálarlig sjúka | 5 | 6 | 11 | **3** |
| Heilsuviðurskifti | 7 | 4 | 11 | **3** |
| Talutrupulleikar | 0 | 5 | 5 | **1** |
| Misnýtslutrupulleikar | 2 | 0 | 2 | **1** |
| Onnur tekin | 15 | 10 | 25 | **7** |
| **Íalt** | **170** | **169** | **339** | **100** |

Barnaverndarstova Føroya og barnaverndartænasturnar meta, at tað hevur áhuga at skráseta, hvørjar trupulleikar teir ymsu fakbólkarnir síggja hjá børnunum, tá tey fráboða eitt nýtt mál. Royndirnar hjá barnaverndartænastunum eru tær, at tað er ikki altíð er tað, málið byrjar við, sum er kjarnutrupulleikin í málinum, tá kanningarnar av málinum eru lidnar.

Á talvu 6 sæst, at bólkurin "Kensluligir trupulleikar" er størsti bólkurin. Talið á dreingjum er nakað væl lægri enn talið á gentum, nevniliga ávíkavist 18 dreingir og 28 gentur. Eisini bólkurin "Trupulleikar í skúlanum" er stórur, men har er býtið millum gentur og dreingir øvugt. Har er bólkurin við dreingjum nevniliga størri við 25 dreingjum, mótvegis 20 gentum. Tá talan er um fráboðanir um kriminellan atburð, bítur ein merki í, at talan er einans um dreingir. Bólkurin umsorganarsvík er eisini ein lutfalsliga stórur bólkur.

Tá tosað verður um umsorganarsvík í barnaverndarhøpi, verður tosað um børn, hvørs foreldur ikki megna dagligu umsorganina fyri barninum. Úrslitið av tí kann verða, at børn fáa sálarlig og kropslig mein. Hetta kann til dømis vísa seg á tann hátt, at børnini ikki hava ein skipaðan gerandisdag, ella neyðugar fysiskar karmar, og kann eisini síggjast aftur í, at børnini ikki eru nøktandi kløtt, ikki hava nøktandi matpakka, ikki koma í song til tíðina, eru kensluliga illa fyri ella hava sjálvoyðandi atburð o.s.fr.

**Talva nr. 7: Orsøkir til at mál byrja, trupulleikar hjá foreldrum**

| Orsøk | Gentur | Dreingir | Íalt | %-býti |
|---|---|---|---|---|
| Ógvuslig misljóð/disharmoni í heiminum | 22 | 26 | 48 | **16** |
| Hjúnaskilnaður | 26 | 13 | 39 | **13** |
| Misnýtslutrupulleikar | 21 | 15 | 36 | **12** |
| Sálarlig sjúka | 19 | 14 | 33 | **11** |
| Kensluligir trupulleikar | 13 | 15 | 28 | **9** |
| Umsorganarsvik | 7 | 17 | 24 | **8** |
| Harðskapur ella hóttan um harðskap | 12 | 3 | 15 | **5** |
| Heilsuviðurskifti | 3 | 8 | 11 | **4** |
| Deyð | 4 | 7 | 11 | **4** |
| Vantandi netverk | 4 | 4 | 8 | **3** |
| Sjálvoyðandi atburður | 3 | 1 | 4 | **1** |
| Kynsligur ágangur | 2 | 2 | 4 | **1** |
| Kriminellur atburður | 2 | 2 | 4 | **1** |
| Seinmentur - intellektuellar forðingar | 0 | 3 | 3 | **1** |
| Onnur tekin | 15 | 16 | 31 | **10** |
| **Íalt** | **153** | **146** | **299** | **100** |

Tá barnaverndartænasturnar skráseta orsøkirnar til, at barnarvendarmálið byrjar, er hjúnaskilnaður og trupulleikar í heiminum millum foreldur ein stórur bólkur. Barnaverndartænasturnar hava seinastu árini staðfest, at tær oftari og oftari verða partur í málum, tá foreldur fara hvør til sítt. Bólkurin, har foreldrini hava sálarligar trupulleikar, er eisini ein lutfalsliga stórur bólkar.

Eisini bólkurin, har foreldrini hava misnýtslutrupulleikar er stórur, og ofta er talan bæði um misnýtslu og sálarligar trupulleikar. Barnaverndartænasturnar royna tá, at samskipa arbeiðið teirra við onnur fakfólk, sum hava serkunnleika og vitan um misnýtslu og sálarliga sjúkur.

# 3. Fígging – kostnaður av barnavernd

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, var tað sambært barnaforsorgarlógini, barnaverndarnevndirnar, sum tóku avgerð í barnverndarmálum, meðan landið rindaði útreiðslurnar av málunum. Eitt av endamálunum við nýggju lógini var, at fáa greitt fíggjarligt ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á barnaverndarøkinum. Lógin ásetur tí, at kommunurnar bera kostnaðin av tí fyribyrgjandi partinum av barnverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðan landið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorgnaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn, men kommunurnar gjalda brúkaragjald.

**Talva nr. 8: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. íbúgva**

| Barnaverndar øki | Fólkatal | Kostnaður í tús. kr. | Kostnaður pr. íbúgva |
|---|---|---|---|
| Sosiala deild Tórshavn | 19.649 | 15.618 | **795** |
| Sosiala deild Runavík | 6.068 | 1.814 | **199** |
| Sosiala deild Klaksvík | 5.127 | 3.280 | **640** |
| Barnaverndartænastan, Sandavágur | 4.946 | 3.562 | **720** |
| Barnaverndartænastan í Sunda kommuna | 3.192 | 1.765 | **553** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 3.105 | 369 | **119** |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu | 1.961 | 257 | **131** |
| Suðuroyar Sunnara barnaverndartænasta | 1.739 | 165 | **95** |
| Barnaverndartænastan í Fuglafirði | 1.553 | 1.132 | **729** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 1.438 | 1.102 | **766** |
| **Alt landið** | **48.778** | **29.064** | **596** |

Barnarverndarøkið kostaði í 2009, 29 mió. kr. samlað fyri allar kommunalu barnaverndartænasturnar.

Kostnaðurin pr. íbúgva var í miðal fyri landið kr. 596, meðan hann fyri Tórshavn var kr. 795 pr. íbúgva. Eisini Sandoy, Fuglafjørður og Sandavágur liggja omanfyri landsmiðaltalið í kostnaði. Barnaverndartænasturnar í Suðuroy, Runavík og Eysturkommunu lógu undir landsmiðaltalið. Fyri Tvøroyri er soleiðis, at her valdar ein ávís óvissa, tí hóast økið hevur ein tann bíligasta kostnaðin pr. íbúgva, er hetta økið tað, ið hevur flest mál í % av barnatalinum. Hetta hongur ivaleyst saman við, at barnaverndarøkið í Suðuroynni í hesum tíðarskeiði varð býtt í tvey økir.

Í kostnaðinum er ikki íroknað løn til starvsfólk í umsitingunum í barnaverndartænastunum, samsýning til barnaverndarnevndirnar og kostnaðurin av rakstrinum av Barnaverndarstovu Føroya. Ætlanin er at fáa hesi tøl við í hagtalsskipanina næsta ár.

**Talva nr. 9: Kostnaður av Barnaverndarøkinum, tús. kr.**

| Barnaverndarøki | Fostur-/umlættin-garskipanin | Kostnaður av § 15 fyri-skipanum | Stovnsút-reiðslur | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| Sosiala deild í Tórshavnar kommunu | 7.384 | 1.973 | 6.261 | **15.618** |
| Sosiala deild í Runavík | 567 | 1.041 | 206 | **1.814** |
| Sosiala deild í Klaksvík | 1.741 | 1.434 | 104 | **3.280** |
| Sosiala deild í Sandavági | 2.008 | 1.191 | 363 | **3.562** |
| Sosiala deild í Sunda Kommunu | 825 | 738 | 202 | **1.765** |
| Sosiala deild á Tvøroyri | 166 | 204 | 0 | **369** |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu | 0 | 257 | 0 | **257** |
| Suðuroyar Sunnara barnaverndartænasta | 79 | 86 | 0 | **165** |
| Sosiala deild í Fuglafirði | 832 | 131 | 169 | **1.132** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 413 | 683 | 5 | **1.102** |
| **Íalt** | **14.015** | **7.738** | **7.310** | **29.064** |

Umleið helvtin av samlaðu útreiðslunum fer til Fosturforeldraskipanina, meðan ein fjórðingur fer til tær fyribyrgjandi, ella sonevndu §15 fyriskipanirnar, og ein fjórðingur til stovnsútreiðslur.

**Talva nr. 10: Stovnsútreiðslur**

| Útreiðsluslag | tús. kr. |
|---|---|
| Brúkaragjald | **2.399** |
| Bú-og viðgerðarstovnar | **599** |
| Eftirskúlar o.l. | **4.130** |
| Skúlagongd í Føroyum | **22** |
| Stovnsútreiðslur uttanlands | **160** |
| **Íalt** | **7.310** |

Tá talan er um ung, sum ikki trívast, og foreldrini ikki longur megna uppgávuna, er ein góð fyriskipan at senda børnini á eftirskúla eitt tíðarskeið. Tá børnini hava tørv á viðgerð, er tó neyðugt at senda tey á viðgerðarstovn. Tá kann eftirskúli ikki nýtast sum fyriskipan. Kostnaðurin at senda børn á viðgerðarstovn er ein landsútreiðsla, men barnaverndartænasturnar rinda eitt brúkaragjald, sum Almannamálaráðið, sambært kunngerð, ásetur árliga.

**Talva nr. 11: Fosturforeldraskipanin**

| **Útreiðsluslag** | **tús. kr.** |
|---|---:|
| Samsýning til fostur/umlættingarforeldur | **12.752** |
| Vistarhald/klæðir | **404** |
| Stovnan og útbúnaður | **86** |
| Stovnsgjald aðrar kommunur | **286** |
| Lummapeningur til barnið | **114** |
| Annar kostnaður í sambandi við fosturuppihald | **373** |
| **Íalt** | **14.015** |

Nógv tann størsti parturin av útreiðslunum til Fosturforeldraskipanina er samsýning til fosturforeldur. Støddin á samsýningini til fosturforeldur verður ásett í kunngerð frá Almannamálaráðnum og við atliti til, hvussu krevjandi uppgávan er. Her verður millum annað tikið hædd fyri aldri á barni, og um møguligt er, at hava annað arbeiði eisini.

Tað er Fosturforeldraskipanin, sum veitur fosturforeldrum ráðgeving. Hetta verður gjørt við regluliga at skipa fyri fakligum skeiðum og útbúgving til fosturforeldur. Fosturforeldraskipanin hevur eisini fastar supervisjónsbólkar fyri fosturforeldur. Harumframt er møguleiki at fáa ráðgeving og supervisjón hjá sálarfrøðingi og familjuráðgeva á Barnaverndarstovuni eftir tørvi.

**Talva. nr. 12: BVL §15 -fyribyrgjandi fyriskipanir**

| **Útreiðsluslag** | **tús. kr.** |
|---|---:|
| Arbeiðsroynd | **386** |
| Bráðfeingis hjálp | **20** |
| Familjuviðgerð | **1.405** |
| Fíggjarligur stuðul | **482** |
| Kontaktpersónar | **177** |
| Løn til stuðlar | **1.296** |
| Sosialt fripláss | 837 |
| Persónligur ráðgevi hjá barni | **60** |
| Sálarfrøðilig hjálp | **985** |
| Sálarfrøðilig kanning | **187** |
| Sjúku-/misnýtsluviðgerð | **51** |
| Stuðul á stovni | **432** |
| Stuðul í heiminum | **960** |
| Stuðul í skúlanum | **98** |
| Útreiðslur í samb. við stuðulstiltak | **309** |
| Útreiðslur í samb. við frítíðarvirksemi | **7** |
| Útreiðslur útbúgvingar-/arbeiðspláss | **46** |
| **Íalt** | **7.738** |

Talvan vísir, at størstu útreiðslupostarnir eru til familjuviðgerð, løn til stuðlar, stuðul í heiminum og útreiðslur til sálarfrøðiliga hjálp. Møguleikarnir at veita børnum og familjum hjálp eftir barnaverndarlógini eru nógvir. Á talvuni sæst, yvirlit yvir ymiskar fyriskipanir. Høvuðsreglan er, at so leingi tað gagnar barninum, so er grundarlag fyri eini fyriskipan.

Á Barnaverndarstovu Føroya verða nógv børn viðgjørd og kannað av sálarfrøðingi, og hetta sæst aftur í postinum sálarfrøðilig hjálp, sum annars hevði verið munandi størri hjá tænastunum kring landið. Í 2009 vóru 90 samrøðuviðgerðir og 7 kanningar gjørdar á Barnaverndarstovu Føroya.

Eisini hevur Tórshavnar barnaverndartænasta sett ein sálarfrøðing í starv í 2009, sum hevur viðgjørt ein part av børnunum hjá Tórshavnar barnaverndartænastu. Frá hálvum mars - tá sálarfrøðingurin varð settur - og til ársenda, vóru 127 samrøðuviðgerðir og 5 kanningar. Viðmerkast skal, at sálarfrøðingurin til august 2009 hevur starvast hálva tíð.

Fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært § 15 í barnaverndarlógini eru størsti parturin av barnaverndararbeiðinum. Einans, tá ikki er møguligt við fyribyrgjandi fyriskipanunum at geva einum barni ella familju nøktandi hjálp, kann verða farið víðari til aðrar og meira víðgongdar fyriskipanir. Slíkar fyriskipanir kunnu m.a. verða at seta barnið heiman í fosturheim ella á stovn. Flestu avgerðir, um at flyta barnið úr heiminum, verða tiknar við samtykki frá foreldrunum. Hóast samtykki er fingið til vega, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Hetta er fyrst og fremst orsakað av, at tað við nýggju barnaverndarlógini var mett neyðugt at styrkja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum.

## 4. Fosturforeldraskipanin

Kommunurnar stovnsettu eina fosturforeldraskipan fyri alt landið, tá tær settu Barnaverndarstovu Føroya á stovn í 2006. Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum á Barnaverndarstovuni.

Tá umstøðurnar í heiminum eru soleiðis, at tað ikki ber til hjá einum barni at verða búgvandi heima, verður kannað, um barnið kann setast í eina fosturfamilju. Atlit skulu fyrst takast til, um næstrarfólk kunnu góðkennast sum fosturfamilja.

Eitt fosturheim sambært barnaverndarlógini er at skilja, tá ið eitt barn verður sett heiman í eitt annað heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri tí í styttri ella longri tíðarskeið. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim, og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs.

Eitt barn kann setast til fosturs, tá ið:

1) foreldrini samtykkja, at barnið verður sett í fosturheim,
2) barnið ongan verja hevur,
3) barnið fyribils er undir barnaverndarnevndarinnar umsorgan uttan foreldranna samtykki.

Barnaverndarstova Føroya, Fosturforeldraskipanin, fær frá barnaverndartænastunum upplýsingar um barnið, og hvønn tørv barnið hevur, og skal so finna ta røttu familjuna til barnið.

Fosturforeldraskipanin hevur í løtuni umleið 130 fosturfamiljur, sum eru góðkendar, og sum hava børn til fosturs, ella eru tilreiðar at taka í móti børnum til fosturs ella umlætting.

Umráðandi er at finna eina familju, sum hóskar best til ta einstaka barnið

Fosturforeldraskipanin hevur tí fleiri fosturfamiljur í skipanini, sum enn ikki hava børn. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera, at tað einstaka barnið ikki hóskar til hesar fosturfamiljur.

Eisini eru fleiri fosturfamiljur, sum verða nýttar til fleiri fyriskipanir. Til dømis, tá talan er um systkin, ella tá tað snýr seg um umlættingarfamiljur, sum hava fleiri børn í styttri tíðarskeið í senn.

Í 2009 komu 15 nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina. Av hesum var bert ein, sum ikki varð góðkend.

**Talva nr. 14: Tal av børnum til fosturs 1. januar 2010 - býtt eftir aldri**

| Barnaverndar øki | 0 til 6 ár | 7 til 13 ár | 14 til 18 ár | 19 til 20 ár | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosiala deild Tórshavn | 6 | 16 | 7 | 0 | **29** |
| Sosiala deild Runavík | 0 | 2 | 2 | 0 | **4** |
| Sosiala deild Klaksvík | 3 | 6 | 0 | 0 | **9** |
| BVT, Sandavágur | 1 | 3 | 4 | 0 | **8** |
| BVT í Sunda kommuna | 1 | 0 | 0 | 0 | **1** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 3 | 0 | 0 | 0 | **3** |
| BVT í Eysturkommunu | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** |
| BVT, Suðuroyar Sunnara | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** |
| BVT í Fuglafirði: | 0 | 2 | 1 | 0 | **3** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 0 | 1 | 1 | 0 | **2** |
| **Alt landið** | **14** | **30** | **15** | **0** | **59** |

Tórshavnar barnaverndartænasta hevði um ársskiftið 2009/2010, 29 børn, sum vórðu sett til fosturs. Av hesum var størsti bólkurin tey 7-13 ára gomlu, sum var meira enn dupult so stórur sum tey 0-6 ára gomlu og tey 14-18 ára gomlu. Orsøkin er helst tann, at tað gongur nakað av tíð, áðrenn staðfestast kann, at eitt barn ikki kann verða verandi í heiminum. Tí verða børnini ofta eldri enn 6 ár, tá tey verða sett heiman. Tá børnini eru eldri enn 13 ár, kann verða sera trupult, at fáa tey at fella til í eini fosturfamilju, og tí er fyriskipanin at seta børn til fosturs ikki so nógv nýtt til eldri børn.

Annars kann leggjast til merkis, at Barnaverndartænastan í Sandavági hevur heili 8 børn, sum eru sett til fosturs. Hetta lutfalssliga nógv í mun til fólkatalið í økinum.

**Talva nr. 15: Tal av børnum til fosturs 1. januar 2010 - býtt eftir aldri og kyni**

| Barnaverndar øki | 0 til 6 ár | | 7 til 13 ár | | 14 til 18 ár | | 19 til 20 ár | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | D | G | D | G | D | G | D | G | D | G |
| Sosiala deild Tórshavn | 5 | 1 | 9 | 7 | 2 | 5 | 0 | 0 | **16** | **13** |
| Sosiala deild Runavík | 0 | 0 | 0 | 2 | 1 | 1 | 0 | 0 | **1** | **3** |
| Sosiala deild Klaksvík | 2 | 1 | 6 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **8** | **1** |
| BVT, Sandavágur | 0 | 1 | 1 | 2 | 1 | 3 | 0 | 0 | **2** | **6** |
| BVT í Sunda kommuna | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **1** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 1 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **1** | **2** |
| BVT í Eysturkommunu | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **0** |
| BVT, Suðuroyar Sunnara | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **0** |
| BVT í Fuglafirði: | 0 | 0 | 2 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | **3** | **0** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | **1** | **1** |
| **Alt landið** | **8** | **6** | **18** | **12** | **6** | **9** | **0** | **0** | **32** | **27** |

Býtið millum dreingir og gentur, sum eru sett til fosturs, er rættiliga javnt fyri alt landið, nevnliga 32 dreingir og 27 gentur. Aftur her síggja vit, at dreingirnir eru nakað yngri enn genturnar, tá teir verða settir til fosturs.

**Talva nr. 16: Tal av børnum til umlætting 1. januar 2010**

| Barnaverndar øki | 0 til 6 ár | 7 til 13 ár | 14 til 18 ár | 19 til 20 ár | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Sosiala deild Tórshavn | 5 | 14 | 6 | 1 | **26** |
| Sosiala deild Runavík | 2 | 0 | 0 | 0 | **2** |
| Sosiala deild Klaksvík | 0 | 1 | 0 | 0 | **1** |
| BVT, Sandavágur | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** |
| BVT í Sundakommuna | 1 | 1 | 2 | 0 | **4** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 1 | 1 | 0 | 2 | **4** |
| BVT í Eysturkommunu | 0 | 2 | 0 | 0 | **2** |
| BVT, Suðuroyar Sunnara | 0 | 1 | 1 | 1 | **3** |
| BVT í Fuglafirði: | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 0 | 2 | 0 | 0 | **2** |
| **Alt landið** | **9** | **22** | **9** | **4** | **44** |

Tá viðurskiftini í heiminum ella hjá barninum eru soleiðis, at ikki er neyðugt at seta tey til fosturs, men kortini hava tørv á umlætting, kunnu børnini koma í eina fosturfamilju til umlætting. Hetta merkir, at tey í styttri tíðarskeið búgva hjá fosturfamiljuni, men eru ikki umsorganaryvirtikin, og foreldrini hava framvegis foreldramyndugleikan og ábyrgdina av børnunum.

Mest vanliga er, at børnini eru eitt ella tvey vikuskifti um mánaðin til umlætting, men talan kann eisini verða um eitt ávíst tíðarskeið, meðan foreldrini eitt nú fáa viðgerð fyri misnýtslu ol.

Ætlanin við umlætting er, at geva børnum og foreldrum nýggja orku. Koma børnini frá eini familju, sum ikki er so vælvirkandi á øllum økjum, kunnu tey síggja og kenna seg sum part av eini vælvirkandi familju, sum kann geva teimun umsorgan og upplivingar. Nógvar umsóknir koma frá barnaverndartænastunum um at finna fosturfamiljur og umlættingarfamiljur til fyriskipanir, ið settar verða í verk.

Tað er sera trupult at finna fosturfamiljur til umlættingarfyriskipanir. Hetta er eitt sera orku- og tíðarkrevjandi arbeiði fyri fosturforeldraskipanina. Tað, at finna eina fosturfamilju til eitt barn, sum skal í umlætting, kann ofta viðføra, at fosturforeldraskipanin skal vitja fleiri fosturfamiljur, áðrenn rætta fosturfamiljan verður funnin.

Umlætting er ein sjálvboðin fyribyrgjandi fyriskipan, skilt á tann hátt, at barnið ella familjan kann broyta meining eftir, at fosturfamiljan er funnin og ikki ynskja umlætting kortini. Møguligt er ikki at seta í verk umlætting uttan samtykki frá tí foreldrinum, sum hevur foreldramyndugleikan.

**Talva nr. 17: Tal av børnum til umlætting 1. januar 2010**

| Barnaverndar øki | 0 til 6 ár | | 7 til 13 ár | | 14 til 18 ár | | 19 til 20 ár | | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | D | G | D | G | D | G | D | G | D | G |
| Sosiala deild Tórshavn | 4 | 1 | 7 | 7 | 2 | 4 | 1 | 0 | **14** | **12** |
| Sosiala deild Runavík | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **2** |
| Sosiala deild Klaksvík | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **1** |
| BVT, Sandavágur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **0** |
| BVT í Sunda kommuna | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | **1** | **3** |
| Sosiala Deild Tvøroyri | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | **4** | **0** |
| BVT í Eysturkommunu | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | **1** | **1** |
| BVT, Suðuroyar Sunnara | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | **1** | **2** |
| BVT í Fuglafirði: | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** | **0** |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | **1** | **1** |
| **Alt landið** | **6** | **3** | **10** | **12** | **3** | **6** | **3** | **1** | **22** | **22** |

Fyriskipanin, umlætting, verður mest nýtt til aldursbólkin 7- 13 ára gomul, og líka nógvar gentur sum dreingir eru til umlætting. Tórshavnar barnaverndartænasta hevur nógv flest børn í umlætting, meðan fleiri barnaverndartænastur onki barn høvdu til umlætting um ársskiftið 2009/2010.

# 5 . SSP- skipanin

Í 2008 fekk Barnaverndarstova Føroya nýggjar avbjóðingar við tað, at SSP ráðgevingin skuldi verða partur av virkseminum á Barnaverndarstovu Føroya.

Á fundi í Almanna- og heilsumálaráðnum 19. oktober 2006, kunnaði Uni Vestureið, politiinspektørur, Hans Paula Strøm, landsstýrismann um, at løgreglan var farin undir at fyrireika arbeiðið við at seta SSP á stovn í Føroyum.

SSP er formligt samstarv millum skúla, sosialar myndugleikar og politi. Endamálið er at fyribyrgja kriminaliteti millum børn og ung. Í mai 2007 skipaði Hans Pauli Strøm fyri eini ráðstevnu um fólkaheilsu, og eitt av mongu umrøddu málunum var SSP.

Í juni 2007 skipaðu Karen Marie Olesen, fúti, Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum fyri eini ráðstevnu um SSP.

Semja var um, at seta niður ein arbeiðsbólk at fyrireika eina SSP-skipan fyri alt landið. Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri Mentamálaráðið, Almanna- og heilsumálráðið og Løgregluna. Í fyrireikingararbeiðinum ásannaði arbeiðsbólkurin, at tað var eyðsæð, at kommunurnar, eins og

Barnaverndarstovan eisini skuldi vera við í hesum arbeiði, við atliti til ábyrgdina hjá hesum pørtum fyri trivnaðin hjá børnum og ungum.

Ein partur av arbeiðinum var at finna eina hóskiliga staðseting fyri SSP-ráðgevingina. Semja var um, at Barnaverndarstovan hevði eitt fakligt umhvørvi og netverk kring landið, og avtalað varð tí, at Barnaverndarstovan skuldi átaka sær leiðsluna av SSP. Ein ráðgevi varð settur í starv hálvan september 2008.

Ein formlig avtala millum Menta,- Almanna- og Heilsumálaráðið, Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Landfúta, varð undirskrivað 16. juni 2009.

Arbeitt hevur verið miðvíst við, at seta hesa skipan í verk. SSP-skipanin hevur trý stig. Eitt leiðslustig, ein samskipanarbólk og útinnandi bólkar. Leiðarin á Barnaverndarstovuni er limur í samskipanarbólkinum. Landið er býtt í 8 økir og skipað við bólkum, við staðbundnum fakfólkum, ið hava við børn og ung at gera. Bólkarnir hittast 4. - 6. hvørja viku og SSP-ráðgevin luttekur á øllum hesum fundum. Í dag eru umleið 70 fólk við í hesum partinum av arbeiðinum.

Barnaverndarstovan og SSP bjóðaðu 18. september 2009 til áhugaverdan evnisdag um UNG og rúsdrekka misnýtslu. Einir 130 lærarar, sosialráðgevarar hjá barnaverndartænastunum, politi og onnur, ið arbeiða við børnum og ungum vóru við. Undirvísari var Martin Ejlertsen, ið hevur arbeitt nógv ár innan økið, sum viðgeri og við at menna fakfólk, ið arbeiða innan økið. Á evnisdegnum varð dentur lagdur á, at geva luttakarunum vitan og amboð um ung og misnýtslu.

Í november 2009 skipaði SSP-ráðgevingin fyri evnisdegi á Hotel Føroyum, har øll tey, sum varða av SSP-samstarvinum vóru hjástødd. Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø helt setanarøðuna, og við hesum fór SSP-samstarvið endaliga av bakkastokki.

Nú SSP-skipanin endaliga varð staðfest, hevur verið arbeitt miðvíst við, at fáa gongd í virksemi í økisbólkunum. Talan er um ymiskar skipanir og fakbólkar, ið ikki hava eina siðvenju at arbeiða saman. Eitt av høvðusmálunum verður at menna SSP, so at arbeitt verður við almennari fyribyrging, ið vendir sær til øll børn og ung í skúlunum. Harumframt at finna ein leist fyri, hvussu einstaklingamál verða viðgjørd, tá ið børn og ung hava framt lógarbrot.

# 6. Mannagongd og bakgrund

Tann 1. januar 2006 kom nýggja barnaverndarlógin í gildi, og við henni varð Barnaverndarstova Føroya sett á stovn. Uppgávan hjá Barnaverndarstovu Føroya er m.a.:

- at umsita fosturforeldraskipanina
- at veita barnaverndartænastum og samdøgursstovnum holla vegleiðing og ráðgeving
- at virka sum ráðgevi hjá Landsstýrinum á barnaverndarøkinum
- at styrkja og samskipa barnaverndarøkið
- og at fáa til vega hagtøl og skipa fyri gransking og menning av økinum.

Síðan Barnaverndarstova Føroya varð sett á stovn, hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa til vega hagtalstilfar. Byrjað var við fyrst at savna inn tilfar manuelt frá øllum barnaverndartænastunum í landinum. Barnaverndarstova Føroya hevur síðan, í tøttum samstarvi við barnaverndartænasturnar, ment eina elektroniska hagtalsskipan, sum tølini í hesi frágreiðing eru tikin úr.

Barnaverndartænasturnar inntøppa í hagtalsskipanina upplýsingar um tey barnaverndarmál, tey hava, m.a. hvørjar fyriskipanir verða settar í verk, hvørjir trupulleikar eru, og hvør kostnaðurin í tí einstaka barnaverndarmálinum er. Í hagtalsskipanina verða teir upplýsingarnir inntøppaðir, sum barnaverndartænasturnar saman við Barnaverndarstovu Føroya hava mett vera av týdningi fyri at fáa innlit í barnaverndarøkið í Føroyum. Í hagtalsskipanini eru nógv fleiri upplýsingar inntøppaðir enn henda frágreiðing leggur fram. Barnaverndarstova Føroya hevur ætlanir um við jøvnum millumbili at kunngera nýggjar upplýsingar á heimasíðu stovnsins.

Tá talan er um barnaverndarmál, er talan um sera privatar og viðkvæmar upplýsingar, umframt revsiverd viðurskifti. Dátueftirlitið hevur, við heimild í § 35, stk. 1, smb. § 9, stk. 1 og § 10, stk.1 í persónsupplýsingarlógini, givið loyvi til, at Barnaverndarstova Føroya kann viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í tilknýti til hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovuni. Loyvið til viðgerðina av persónsupplýsingum, er treytað av, at ásetingarnar í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni gjørdum broytingum, og kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í samband við persónsupplýsingar, verða hildnar.

**Endamál**

Endamálið við hagtalsskipanini er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum.

Umframt hetta, hevur hagtalsskipanin eisini til endamáls at geva leiðslunum, ið vara av barnaverndarøkinum í Føroyum eina mynd av støðuni í einstøku barnaverndartænastunum við atliti til menning og betran. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu eisini nýtast sum grundarlag hjá kommununum, tá tær leggja til rættis kommunalpolitikkin.

Tá barnaverndarlógin varð sett í gildi 1. januar 2006, fingu allar barnaverndartænastur í landinum skyldu at lata upplýsingar um barnaverndarmál til Barnaverndarstovu Føroya. Barnaverndarstovan hevur ábyrgdina av hagtalsskipanini og hevur saman við KT-tænastuni hjá Tórshavnar kommunu sett upp eina trygga KT-skipan. Tann barnaverndartænastan, sum hevur eitt barnaverndarmál, hevur skyldu til at skráseta málið og tær hendingar, sum eru í málinum til Barnaverndarstovu Føroya. Til allar skrásetingar verður P-talið hjá barninum nýtt. Umframt at skráseta viðurskifti hjá barninum, verða eisini skrásettar upplýsingar um tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum.

**Trygd**

Nógv verður gjørt burturúr, at hagtalsskipanin hjá Barnaverndarstovu Føroya skal vera so trygg sum møguligt fyri at tryggja, at skrásettu upplýsingarnar ikki koma óviðkomandi í hendi. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu einans nýtast til hagtals- og vísindalig endamál.

Hagtalsskipanin er m.a. tryggjað við einari trygdarváttan og eini kryptering í sambandi við ta elektronisku flytanina av data. Harumframt er dataviðgerðin fevnd av tekniskum og umsitingarligum trygdarkrøvum, soleiðis, at hvørt einstakt starvsfólk, sum arbeiðir við hagtalsskipanini, hevur fleiri persónligar kotur til skipanina. Skrásett verður eisini, hvør er inni á skipanini og nær, og hvat skipanin

verður nýtt til. Somuleiðis er stórur dentur lagdur á, at eisini starvsfólkini í einstøku barnaverndartænastunum vísa umhugsni og ansni í sambandi við hagtalsarbeiðið.

**Óvissur**

Barnaverndartænasturnar í landinum byrjaðu at inntøppa í hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovu Føroya í 2008. Av tí, at neyðugt var við eini royndartíð og upplæring fyri at tryggja, at skrásetingarnar verða gjørdar á sama hátt í øllum barnaverndartænastunum, varð ikki ráðiligt at almannakunngera hagtøl úr skipanini í 2008. 2009 er fyrsta árið, at Barnaverndarstova Føroya nýtir upplýsingar úr elektronisku hagtalsskipanini. Sjálvt um hugt hevur verið gjølla eftir, at upplýsingar í skipanini eru rætt inntøppaðir, kann full vissa ikki gevast fyri, at ongin feilir eru í upplýsingunum. Fyri at tryggja, at upplýsingarnar í hesi frágreiðing eru rættar, er hendan frágreiðing send øllum barnaverndartænastunum til ummælis, gjøgnumgongd og góðkenning, áðrenn hon er almannakunngjørd.

Barnaverdarstova Føroya 2010

Oddbjørg Balle, leiðari